## VIÐMERKINGAR

# Skálafjarðartunnilin fær undirtøku

**Alfred Olsen**
*Løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin*



Orðatakið »Tolin trívst« má av sonnum sigast hóskar væl í hesum málinum, tí eftir at hava verið einsamallur talsmaður fyri Skálafjarðartunlinum, fegnist eg um, at vit nú eru fleiri sum taka undir við tunnilsprojektinum.

**Landsstýrismaðurin**
Tað gleddi meg, at landsstýrismaðurin, sum higartil hevur verið sera passivur, nú tekur undir við at undirsjóvartunnil verður gjørdur millum Skálafjørðin og Havnina. Landsstýrismaðurin hevur fingið eina umsókn frá nevndini, sum er mannað við umboðum fyri fíggjarstovn, kommunum og arbeiðsbólki, um at fáa loyvi at fara í gong við tunnilsprojektið.

Eg vil hervið heita á Bjarna Djurholm, um at geva hesum privata felagið loyvi til at fara í gongd við tunnilin beinanvegin.

**Landsverk**
Tað gleðir meg sera nógv, at landsverkfrøðingurin nú boðar frá, hvussu gott og gagnligt hann sær hetta tunnilsprojektið vera fyri tað føroyska samfelagið, umhvørvið, slit á vegir v. m. og tað er púra rætt. Eisini fegnist eg um, at landsverkfrøðingurin nú tosar um tunnil millum Saltnes og Strendur, jú tolin trívst.

**Dimmalætting**
Tað var ein fragd at lesa oddagreinina í Dimmalætting í kvøld, sum viðgjørdi Skálafjarðartunnilin og teir møguleikar hesin gevur fyri alt samfelagið, grunda á tað privata initiativið sum hevur megna at fingið til vega fíggingina av øllum projektinum uppá knappar 800 mió. kr., har ongin króna er úr landskassanum, áðrenn farið er undir arbeiðið og so rámandi spyr Dimma, »jamen, hvat bíða vit so eftir, tað er at lata fólkini sleppa í gongd við arbeiðið«.

Eg eri púra samdur við Dimmu í at fólkini eiga at sleppa í gongd ongantíð ov skjótt, men nú bíða tey bara eftir svarinum frá Bjarna Djurholm, til at fara í gongd og eg vóni og rokni við, at svar kemur frá Bjarna Djurholm í dag, heldur enn í morgin.

**Fyrireikararnir**
Kunnu vit tosa um »eldsálir«, so er her veruligar talan um »eldsálir« sum í frítíðini hava fyrireikað og gjørt projektið til Skálafjarðartunnilin, serliga teir sum hava mannað arbeiðsbólkin, men eisini kommunurnar við Skálafjørðin og nú eisini fíggingarstovnurin.

Eg vóni ikki og kann ikki ímynda mær, at Bjarni Djurholm kemur at draga tíðina út og blanda tingini saman, og hví skuldi hann tað, tí fyrireikararnir hava bara biðið um at fáa loyvi til at fara undir projektið, har linjuføringin og útbjóðingarháttur v.m. ikki eru við, so her er onki at bíða við? Men tað er at lata fólkini sleppa í gongd við arbeiðið.

**Fíggjarligar sparingar**
Eitt dømi um hvørjar fíggjarligar sparingar Skálafjarðartunnilin viðførir, er, at virðið í spardum tímalønum v.m. hjá fólkunum sum í dag koyra úr Havnini ella til Havnar, er uml. 2 mió. kr. um vikuna, og tí ræður tað um at koma í gongd við arbeiðið so skjótt sum gjørligt, so Skálafjarðar-tunlarnir eru lidnir á Ólavsøku 2011.

# Miðflokkurin vil fylkja fólk ímóti lógaruppskotinum um samkynd

**Miðflokkurin rópar nú varskó, tí tað hevur eydnast at fáa nøkur fá tingfólk at taka undir við teimum fyri samfelagið niðurbrótandi lógunum um verju av samkyndum. Tí kallar flokkurin til fundar á Sjómansheiminum í kvøld**





**TÍÐINDASKRIV**
*Vegna Miðflokkin*
*Jenis av Rana*
*Bill Justinussen*

Í øldir hevur kristna trúgvin verið grundarstøðið, føroyska samfelagið trygt hevur hvílt á. Sjáldan hevur spurnartekin verið sett við hesi grundleggjandi virði, ið øll løggáva og samfelagsbygnaður annars eru grundað á. Júst hendan virðingin fyri og álitið á hin Almáttuga eigur æruna fyri tí menning og framgongd, sum hevur lyft føroyska samfelagið upp millum tryggastu lond at liva í.

Seinastu tíðina hevur ein lítil minnilutabólkur roynt at ávirka samfelagið aðrar leiðir við at krevja serrættindi, sum avgerandi stríða ímóti orði Guðs. Men júst tí at samfelag okkara hvílir á trygga kristna grund, eru allir bólkar, eisini hesi fáu, væl vard av verandi lógum.

Harmiligt er, at tað hevur eydnast hesum fáu at fáa tingfólk – um enn bert fá – at taka undir við hesum fyri samfelagið niðurbrótandi ætlanum. Hetta eigur at fáa øll, sum vilja landi og fólki væl, at reisast og standa saman um Guðgivnu samfelagsvirði okkara, sum annars lættliga kunnu fara fyri skeytið.

Miðflokkurin kallar tessvegna til fundar á Sjómansheiminum í Havn mikukvøldið kl. 19.30, har dagsins politiska støða verður viðgjørd.

# Náttarbussar kunnu hótta hýruvognsvinnuna

**Um Tórshavnar býráð ger álvara av at seta náttarbussar til at koyra fólk í býin og heim aftur í vikuskiftinum, kemur tað at taka grundarlagið undan hýruvognsvinnuni í býnum, sigur nevndin í hýruvognsfelagnum Samfylking**




**HÝRUVOGNSFELAGIÐ SAMFYLKING**

Hýruvognsvinnan hevur tað ikki ov gott í løtuni, sigur nevndin í hýruvognsfelagnum Samfylking. Limirnir í nevndini halda fyri tað fyrsta, at býraðið hevur givið alt ov nógv hýruvognsloyvir, tí tað eru ov nógvir hýruvognar í mun til ta koyring, ið er.

Fyrst komu minibussarnir (ein grá sona, ið býráðið einki gjørdi við). Hesir hava tikið nógva koyring frá hýruvognunum, sum koyra frá góðkendu hýruvognsstøðunum í býnum, og nú er talan um, at náttarbussar eisini skulu koyra í býnum í vikuskiftinum.

Á ungdómsráðstevnuni í Havn »Hetta er tín kommuna«, sum fyrst og fremst var ætlað teimum 14-18 ára gomlu, kom fram, at tørvur er á einum náttarbussi í Havn í vikuskiftinum, har møguleiki verður hjá teimum ungu, sum búgva uttan fyri miðbýin, at verða koyrd við bussi í býin og heim aftur um náttina. Víst varð á, at foreldrini høvdu kent seg tryggari við eini slíkari skipan.

**Hvar er tryggleikin?**
Nevndin í Samfylking heldur, at tað er í ordan at býráðið ger nakað fyri at ungdómurin skal hava góðar umstøður, men tað er ein sjálvmótsøgn í, at býráðið bæði gevur loyvir til eitt ávíst tal av hýruvognum, fyri síðan at taka grundarlagið undan so gott sum allari hýruvognsvinnuni. Hetta hevði verið steinur oman á byrðu hjá hýruvognsvinnuni. Tey ungu koma tryggari heim í hýruvogni, tá tey verða koyrd til hús, í mun til at ein bussur steðgar við bussteðgistøðini, og tey síðan mugu ganga víðari til hús.

Ein nýggj hýruvognsreglugerð hevur verið er á veg í longri tíð, men nevndin skilir als ikki, at hýruvognsfelagið ikki verður tikið upp á ráð í hesum sambandi.

Um taksturin hjá náttarbussunum verður tann sami sum í vanligu býbussunum, heldur Samfylking, at tað verður skjótt, at tey ungu fara at brúka bussarnar sum uppihaldsstað. Tí tey hava onga aðrastaðni at fara.

Spurningurin er um, hvat er tryggasta og besta tænastan hjá ungdóminum, tí vanliga er tað soleiðis, at fleiri leiga ein hýruvogn saman, tá verður tað ikki so dýrt fyri hvønn persón. Nevnt verður sum dømi, at tá trý ella fýra fólk leiga ein hýruvogn um náttina, og túrurin t. d. kostar 100 krónur, verður tað ikki meira enn millum 25 og 33 krónur í part. Fyri 40 árum síðan kostaði kostaði ein býtúrur 5 krónur um dagin og 7 krónur um náttina, tá var tímalønin um 5 krónur. Í dag kostar ein býtúrur 55-60 krónur um dagin og 70-80 krónur um náttina, og tímalønin er um 100 krónur. So tað er lutfalsliga bíligari at leiga ein hýruvogn í dag enn fyri 40 árum síðan.

Tað er eisini ein sannroynd, at tað helst ongastaðni er so bíligt at leiga ein hýruvogn sum í Føroyum. Sum nevndin í Samfylking skilir tað, er ætlanin at náttarbussurin í vikuskiftinum skal koyra alla náttina við hálvum tíma ímillum. Bussurin skal eisini koyra, tá onnur serlig tiltøk eru í býnum.

**Hýruvognsvinnan doyr burtur**
Nevndin heldur, at býráðið við hesum er í ferð við at stuðla upp undir at hýruvognsvinnan spakuliga doyr burtur. Fyri at raksturin av einum hýruvogni skal hanga saman er tað blivið soleiðis, at koyringin í vikuskiftinum fyri flestu hýruvognseigarar er alneyðug.

Samfylking vísir eisini á, at hóast ein meiriluti í teknisku nevnd hjá býráðnum hevur samtykt, at í ávísum økjum í býnum skulu skelti setast upp til hýruvognar, og býráðsformaðurin á fundi við nevndina eisini meinti, at tað skulu enn fleiri skelti setast upp, hendir einki á hesum øki. Nógv skelti mangla enn.

Samfylking vísir á, at býráðið hevur arbeitt beint ímóti galdandi løgtingslóg um hýruvognskoyring í Tórshavnar kommunu. Í hýruvognsreglugerðini fyri kommununa stendur m. a., at tá loyvi verða givin til hýruvognskoyring, skulu tey hava verið til ummælis hjá vinnufelag ella vinnurekandi, men nevndin í Samfylking verður als ikki eftirspurd.

Eisini stendur í reglugerðini, at hýruvognsloyvini eru treytað av, at tey verða nýtt til fulltíðarvinnu, og at hýruvognsnevndin ásetur talið av loyvum eftir fyriliggjandi vinnuloyvum og nýtslu av hesum, og eftir tørvinum á eini rímiligari tænastu hjá íbúgvunum í kommununi og møguleika fyri rímiligari inntøku hjá teimum vinnurekandi.

Nevndin í Samfylking setur eisini spurnartekin við, hvør tað er sum ræður viðvíkjandi hýruvognsloyvunum, er tað býráðið, ella eru tað bilstøðirnar.

*Formaður í hýruvognsfelagnum Samfylking er Magnus Fuglø.*